Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingskvinna

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Átøk í krabbameinsætlanini

Spurningar:

1. Hvørji átøk í nýggju krabbameinsætlanini eru sett í verk?
2. Hvørji átøk eru ávegis?

Viðmerkingar:
Í Føroyum er krabbamein tann sjúkan, sum krevur flest mannalív. Tíbetur eru fleiri og fleiri, sum fáa heilsubót. Tað vísa hagtølini fyri, hvussu nógv liva fimm ár eftir, at tey fingu staðfest krabbamein. Somu hagtøl vísa tíanverri, at av Norðurlondunum liggja vit aftast.

Í samgonguskjalinum frá 2023 stendur, at átøk í krabbameinsætlanini skulu fremjast.

Krabbameinsætlanin er frá 2022 og varð handað táverandi landsstýrismanni í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, 8. apríl 2022. Í krabbameinsætlanini eru 69 tilmæli. Nøkur av hesum tilmælum eru at screena fyri tarmkrabba, herd átøk móti royking, endurmenna krabbameinssjúklingar, einføld og gjøgnumskygd ávísingarskipan fyri at nevna nøkur.

Á Løgtingi, 11. apríl 2024

Súsanna Bertholdsen